# Mótvindur herdi y

Mótgongd í London hevur ment hana, og við eini rúgvu av royndum í viðførinum fer føroyski sangfuglurin Sigrið Rasmussen nú undir ein nýggjan kapittul í Noregi. Í samrøðu við Sosialin greiðir Sigrið frá beiskum men mennandi royndum í London, arbeiði hennara við neyðstøddum børnum, tíðini í norska gentubólkinum Grace og nýggju ætlanum hennara í Noregi



– Tað týdningarmesta er at gerast ein betri tónleikari. At kunna vera til íblástur fyri onnur og geva fólki nakað. Um onkur steðg ára gamla Sigrið Rasmussen úr Tórshavn, sum eftir trý ár í London nú fer til Noregs at royna seg

TÓNLEIKUR
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

– Onkuntíð føli eg, at eg ikki eri nakrastaðni yvirhøvur, er tað fyrsta, hon sigur, tá hon verður spurd, hvar hon er stødd í síni tónlistarligu yrkisleið.

Songkvinnan úr Tórshavn, Sigrið Rasmussen, stendur á einum vegamóti. Trý ára long bachelorútbúgving í sangi á Thames Vally University í London er júst farin aftur um bak, og Sigrið hevur gjørt av, at hon ikki fer í holt við yvirbygningin á universitetinum í London. Í øllum førum ikki í fyrstu atløgu.
Og Sigrið hevur upplivað eitt sindur av hvørjum seinastu trý árini í Eysturlondon. Vónbrot, niðurtúrar og harðir dagar hava verið á menuini, men eisini nýggjar, spennandi og mennandi upplivingar. Og hon setti punktum við at verða kosin besti sangari á stóra og viðurkenda universitetinum.

## Beiskar royndir

Sigrið letur ongan iva vera um, at hon er glað fyri seinastu trý árini og metir, at hon er ment sera nógv, tí umframt at syngja hevur hon eisini lært at skriva, komponera, framleiða og samskipa tónleik. Hon greiðir frá, at hon í dag í nógv størri mun kann framføra sítt egna tilfar, og tí hevur hennara tónleikur fingið enn størri týdning fyri hana persónliga.

– So ein kann róliga siga, at eg fari úr Onglandi við eini rúgvu av royndum við í viðførinum, sigur Sigrið við einum smíli. Men samstundis ger hon greitt, at lívið sum tónleikari ikki bert er ein dansur á rósum, og at talan eisini hevur verið um mótgongd í stórbýnum.

– Tónleikaheimurin er ein harður og náðileysur heimur, og nógvir vandar liggja og lúra. Kappingin millum øll talentini er hørð, og tú kanst sera lætt verða útnyttaður, sigur Sigrið.
Hon greiðir frá, at hon av og á hevur varnast, at fólk bert eru úti eftir at útnytta hana við persónligum vinningi fyri eyga, og hesar upplivingar hava verið ræðandi, samstundis sum tær eisini hava ment hana.

– Tað kann vera hart ikki at hava álit á fólkunum kring teg og teimum, tú samstarvar við, staðfestir Sigrið. Spurd, hvat hon ítøkiliga meinar, tá hon tosar um mótgongd og vónbrot, fer hon at greiða frá, at hon fyri stuttum var fyri einum stórum vónbroti.

– Síðani á jólum havi eg arbeitt við eini fløgu, og eg havi havt ein sáttmála við eitt sokallað »underground« plátufelag í London. Alt var klárt at geva út, men tað vísti seg tíverri, at hetta plátufelagið hevði lovað meiri, enn tað megnaði at halda. Ósemjurnar og misálitið fekk meg at siga stopp, og tað var ein torfør avgerð sjálv at avlýsa eina verkætlan, sum eg hevði lagt so nógva orku í, greiðir ein opinskárað Sigrið Rasmussen frá.

## Hjálpti neyðstøddum børnum

Umframt hennara skúlagongd, virðisløn fyri besta sangara og fløguætlanir hevði Sigrið onnur jørn í eldinum í London. Í tilafturskomna økinum Hackney tók Sigrið sær av einum barnakóri í eini samkomu, og undirvísti Sigrið teimum í sangi. Felags fyri hesi børnini, sum vóru frá 11 til 16 ára gomul, var, at tey øll høvdu eina trupla fortíð og livdu undir hørðum umstøðum. Sigrið greiðir frá, at flestu teirra válaðu svikin, forsømd og einsamøll í fátæka býarpartinum. Sigrið røkti hesa uppgávu av sínum eintingum, uttan at undirvísingin hevði nakað tilknýti til skúlagongdina.

– Tað hevur stóran týdning fyri meg at kunna hjálpa øðrum, sum ikki hava somu møguleikar sum eg. Hesi børnini vóru so evnarík men høvdu onga vegleiðing og ongan at taka sær av teimum, og arbeiðið í hesi samkomuni fekk størri og størri týdning fyri meg persónliga, tí eg fekk so nógv burturúr sjálv, greiðir Sigrið frá. Gospelkórið hjá Sigrið við myrku børnunum úr London framførdi eisini í eini stórari kirkju, og henda dagin minnist Sigrið sum eitt hæddarpunkt gjøgnum tey trý árini í Onglandi.

– You touched some hearts today, søgdu áhoyrararnir aftaná konsertina, og hetta var ein fantasisk uppliving, minnist Sigrið aftur. Og tá hon aftur fer at vitja London, leggur hon fyrst og fremst leiðina framvið hjá børnunum, sum hon knýtti so sterk bond til.

## Nýggjur kapittul

Men London er nú fyribils fortíð, og eitt nýtt kapittul byrjar. Eftir summarfrítíðina í Føroyum fer Sigrið til Noregs at royna nýggjar leiðir á gomlum gøtum. Hon hevur búð í Noregi frá 1995 til 2001, og ørindini eru at fáa ferð á tónlistarligu yrkisleiðina. Við eini rúgvu av royndum í viðførinum byrjar sostatt eitt nýtt tíðarskeið fyri hennara viðkomandi, og sjálv sigur Sigrið, at tað heila í veruleikanum er rættiliga opið.

Hon greiðir frá, at hon hevur samband við fleiri topp-professionellar tónleikarar og fingið nógvar nýggjar kontaktir í Noregi, og væntandi fer ein fløga at spyrjast burturúr í framtíðini. Endamálið er at fáa ein sáttmála